# Bilar

Nr. 29 • hósdagur • 12. februar 2004 • 78. árg.



*PT Cruiser sær út av nøkrum í ferðsluni*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Chrysler PT Cruiser 2,0 Limited:

# Sjarmerandi amerikanari

**Amerikanski familjubilurin Chrysler PT Cruiser er ein av teimum mest sermerktu á marknaðinum úti í heimi. Bilurin, sum upprunaligur varð gjørdur sum ein konseptbilur, vekjur undran og áhuga hvar hann kemur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Havnarmaðurin Jørgin Gunnarsson, sum býr á oynni Bømlo í Norra, viðjaði í fjør heyst í Føroyum við sínum PT Cruisara. Bilurin hevur ordiligar skermar og trinbrettir*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Fyri tann sum vil verða sæddur í ferðsluni, er Chrysler PT Cruiser ein ynskidreymur, bilurin er bæði nútímans og gamaldags.

Chrysler hava seinnu árini verið sera djarvir, tá tað snýr seg um at gera bilmodell, sum bróta við vanliga vanahugsan. PT Cruiser bleiv upprunaliga gjørdur sum ein konseptbilur til eina bilaframsýning, men bilurin bleiv so væl móttikin, at avgerð varð tikin um at seta bilin í framleiðslu, og hann kom á marknaðin í 1999.

Her hjá okkum er eingin PT Cruiser, bilurin verður ikki seldur í Føroyum. Men í fleiri av grannalondum okkara verða teir seldir – eisini í Danmark.

Hóast bilurin sær út av nógvum, er hann ikki so stórur, hann er í støddi við t.d. Renault Scénic og Mazda Premacy. Talan er um ein væl útgjørdan og rúmligan familjubil, har tey ferðandi sita høgt og hava gott útsýni.

## Én stor lykkepille

PT Cruiser líkist einum bili frá 40-unum við ordiligum skermum og trinbrettum. Eisini fæst nógv ymisk eykaútgerð til bilin, soleiðis at hann kann koma at sígga uppaftur eldri og meira charmerandi út – óteljandi møguleikar.

Í fjør heyst var ein PT Cruiser í Føroyum. Jørgin Gunnarsson, sum býr á oynni Bømlo í Norra, hevði sín PT Cruisara við sær, tá hann vitjaði her. Hann sigur, at øll sum hann møtir gera onkra viðmerking um bilin, summi siga, at tey blíva í góðum lag av at síggja bilin, onnur standa bara undrandi. Í einum donskum bilblaði stóð at lesa: »PT Cruiseren er genial – én stor lykkepille, hver gang man forlader den får den et lille klap og et stort smil«.



*Designið er ein blanding millum nýtt og gamalt*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*PT Cruiser innan. Leggið til merkis girstongina – sum í gomlum døgum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Chrysler PT Cruiser 2,0 Limited**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur, 4 syl., bensin, 141 hk |
| 0-100 km/t | 11,3 sek |
| Bensinnýtsla | 11,9 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 429,0 cm |
| Breidd | 170,0 cm |
| Hædd | 160,0 cm |
| Vekt | 1.375 kg |
| Viðførisrúm | 538 / 1821 litrar |
| Prísur (í Danmark) | uml. 300.000 kr. |



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**




**FORD FOCUS STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg 16.maj 2002, Km 41.000. Sum nýggjur: Turbo Diesel - Centrallás- El-rútar- Hita í forrúti - Hita í forsetrum - Radio v.bandsp. v.m. Selist vegna keyp av 7. pers. bili.
Kr. 168.000.



**TOYOTA LAND CRUISER DIESEL**
Árg Maj 1986, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur. Bert koyrt km 136.000 - í góðum standi. Nýsýnaður. Kr. 30.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mar-97, Km. 152.000. Fjarstýrt centrallás-El-rútar- El-spegl-Spoylara aftan- Alufelgur- v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 56.000.
Kr. 66.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Sera vælhildin: Centrallás- El-rútar- El-spegl- Radio v.bandspælara v.m. eyka tectylviðgjørdur. Kr. 78.000.



**TOYOTA AVENSIS 1.8**
Árg Aug-99, Km 65.800. Sera vælhildin: Centrallás- El-rútar. fr.- C.D.Anlegg- Eyka hjólsett v.summardekkum. Selist vegna serligar umstøður. Kr. 120.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL**
Árg 03 Marts 1993, Km 82.000. Sera vælhildin: El. Sóltak- Centrallás- El-rútar-El-spegl- Radio v.bandspælara v.m. tectylviðgjørdur 3 hvørt ár. 1 eigari. Kr. 60.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin: Aircondition- Alufelgur- Fjarstýrt centrallás- El-rútar-El-spegl v.hita. C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.

P/f D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**



**FORD FOCUS**
Árg 2000, Km 49000. Kr. 132000 – 1.6i stw. sýnaður 2003. sentrallás, servostýring, elrútar, elspegl, hita í setrum.



**FORD MONDEO**
Árg 1999, Km 89000. Kr. 125000 – Servostýring, sentrallás, hita í setrum, elrútar, aircondition, heilársdekk, sýnaður 2003.



**FORD FIESTA**
Árg 2000, Km 60000. Kr. 88000 – Fløguspælari, servostýring, hita í setrum, væl hildin.



**FORD MONDEO**
Árg 1998, Km 48000. Kr. 128000 – Væl útgjørdur, heilársdekk, sýnaður 2003.



**FORD EXPRESS VAN**
Árg 2001, Km 55000. Kr. 59000 – 1.8 diesel. Prísurin er við mvg.



**CITROÎN ZX**
Árg 1997, Km 177000. Kr. 59000 – Servostýring, sentrallás, fløguspællara,góð píkadekk.



**DAEWOO NUBIRA**
Árg 1999, Km 46000. Kr. 99000 – 2.0i aut.gear. Elrútar, elspegl, fjarstýrt sentrallás, leðursetur, fløguspælara, hundagittar, alufelgur.



**FORD ESCORT**
Árg 1995, Km 120000. Kr. 50000 – Væl hildin Ford Escort.



**MAZDA PREMACY VAN**
Árg 2002, Km 71000. Kr. 145000 – Centralás, aircondition, servostýring, píkadekk.



**VW TRANSPORTER**
Árg 2001, Km 60000. Kr. 148000 – Prísurin er við mvg. Sentrallás, servistýring, í góðum standi.



**DAEWOO NUBIRA**
Árg 1998, Km 82000. Kr. 69000 – Sleipikrók, servustyring, elspegl, elrútar.



**CITROÎN XANTIA**
Árg 1998, Km 142000. Kr. 118000 – Sentrallás, servostýring, hita í setrum , elspegl, væl hildin.



**HYUNDAI ACCENT**
Árg 2002, Km 31000. Kr. 118000 – 1.5i. Sum nýggjur, servostýring, sentrallás, elrútar, elspegl, fløguspælari, aircondition, heilársdekk, eykasett av sportfelgum .

Ford **P/f Wenzel**
AKRANESGØTA 5 TEL 354500 FAX 354501
Opið mána- fríggjadag: 8-17, leygardag: 10-14
www.wenzel.fo



**SKODA FABIA 1,2 MPI**
Árg mai 2003, Km 5.600. Bilurin er bert 8 mánaðir gamal, sera vælhildin og lítið brúktur.
Kr. 105.000.
**Tel. 216135**

**VARPIÐ**
**Skráir og ummælir Hvønn fríggjadag**
**20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna**
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

BILATORGIÐ

**Sosialurin**
*Lesið Sosialin - tað loysir seg*